# ítróttur

Nr. 169 • týsdagur • 7. september 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# Avkláraður venjari

**Eg havi sagt tað fyrr – og tað fer helst eisini at henda aftur – at hava vit ein dag, har einir 4-5 leikarar eru undir sítt vanliga støði, so fáa vit slík úrslit, staðfesti Henrik Larsen eftir stórtapið í Sveis**

LANDSLIÐSVENJARIN
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*

**Basel, Sveis:** Sum vera man, so var tað ikki tað heilt stóra, sum Henrik Larsen hevði at siga um dystin móti Sveis, tá tíðindafundur varð hildin. Spurningarnir til føroyska venjarin vóru eingir í tali frá fremmandu pressuni, og tí gekk skjótt hjá honum at koma yvir til føroysku umboðini.

– Vit gera nøkur mistøk í dag, og vit vita jú av, at tað verða revsaðir fyri. Samstundis sært tú eisini, at nakrir av teirra leikarum spæla fyri stórfeløg í Europa. Og spæla vit ikki upp til okkara besta tá, so tapa vit stórt.

Kann tað hugsast, at tað er komandi dysturin móti Fraklandi, sum hevur órógvað leikararnir sinniliga?

– Tað vóni eg ikki. Fyrst og fremst, so haldi eg, at vit vóru hart raktir av hitanum. Tá tú fyrst hevur tikið einar fimm-seks túrar eftir vøllinum, so byrjar tað at verða tungt, og leikararar missa konsentratiónina. Samstundis gera vit alt ov nógv mistøk, sum vit ikki hava ráð til. Eg havi sagt tað fyrr – og tað fer helst eisini at henda aftur – at hava vit ein dag, har einir 4-5 leikarar eru undir sítt vanliga støði, so fáa vit slík úrslit.

Mikudagin er aftur dystur á skránni, so føroysku leikararnir hava ikki nógva tíð at reisa seg. Mest av øllum, so tykist avbjóðingin hjá Henrik at vera á sálarliga støðinum til ta uppgávuna, og sjálvur helt hann eisini, at her er nakað at arbeiða við.

– Hava nýtt nógvar kreftir, so hvíld er í øllum førum neyðug. Men sjálvandi mugu vit eisini inn at rætta nøkur mistøk, og so seta liðið eftir tí, sigur Henrik, og avdúkar kanska við hesum, at talan verður um broytingar til dystin mikudagin.




*Hóast hann ikki var nøgdur um spælið, so helt Henrik Larsen, at føroyska liðið hevur fingið góðan styrk við Claus Bech Jørgensen*

### UG til Claus

Størsti spenningurin undan dystinum var kanska, hvussu nýggi leikarin hjá føroyingum fór at standa seg. Av ummælunum framgongur, at hann so avgjørt ikki dumpaði, og sjálvur tóktist Henrik eisini vera nøgdir um avrikið hjá Claus.

– Eg haldi hann gjørdi tað framúrskarandi. Sjálvandi er hann við hasum reyða hárinum eitt sindur hart raktur av hitanum, men tú sært, at hann hevur evnini. Hann tordi eisini at bjóða av, men móti endanum var krútið tó uppi hjá honum, staðfesti landsliðsvenjarin at enda.


Listaframsýningin
GLOTTAR
Við Øssur Mohr
Er opin til sunnudagin 12. september



Opið er:
Týsdag til fríggjadag kl. 14.00 til 17.00
Leygardag og sunnudag kl. 14.00 til 18.00

Listasavn Føroya
TEL 313579 · WWW.ART.FO

Sosialurin 341800


# Starturin kundi ikki havt verið betri

**Sveisiski venjarin var væl nøgdur við álopsspælararnar, men hann roknar við størri mótstøðu næstu ferðirnar, enn hon var frá føroyingunum**

SVEIS-FØROYAR
*Jóannes Hansen*

Sveisiski venjarin, Jakob Kuhn var ovurfegin um stóra sigurin, sum hansara menn høvdu vunnið í fyrstu roynini á vegnum ímóti HM endaspælinum, sum verður í Týsklandi um tvey ár. Tað kiksaði hjá Sveis, tá ið teir royndu at kvalifisera seg til endaspælið í 1998 í Fraklandi, og tað kiksaði aftur, tá ið teir royndu at sleppa upp í part í Japan/ Korea í 2002.

– Álopsspælararnir vóru óførir. Teir skoraðu trý mál í part, og tað ber ikki til at rokna við fleiri málum enn tí. Men eg ivist ikki í, at hini mótstøðulondini fara at ansa betri eftir teimum, enn tað varð gjørt hesa ferð. Tá verður uppgávan hjá okkara monnum at vísa sína sonnu styrki, helt Jakob Kuhn eftir dystarenda.

Venjarin var sjálvandi sera væl nøgdur við, at tað hevði eydnast at vunnið so sannførandi sigur í fyrsta HM undankappingardystinum. Frammanundan hevði Sveis spælt fýra kappingardystir á rað uttan at hava vunnið.

Johan Vonlanthen, sum er átjan ára gamalur, var fyrr í summar yngsti spælarin, sum nakrantíð hevur skorað mál í EM endaspælinum. Málið hjá honum ta ferðina var tað fyrsta fyri landsliðið. Nú hevur hann spælt seks landsdystir, og hann hevur skorað fýra mál.

Hin málskjúttin, Alexander Rey, hevði ikki verið á landsliðnum síðani í apríl 2001.

Mikudagin verður næsta uppgávan á vegnum ímóti endaspælinum í Týsklandi á skránni hjá Sveis. Tá skulu teir spæla á heimavølli ímóti Írlandi.



*Sveisiski venjarin var sjálvandi sera væl nøgdur við, at tað hevði eydnast at vunnið so sannførandi sigur í fyrsta HM undankappingardystinum*





# 3rd Klaksvík International – Heini nr. 3

**Eftir eina javna fyrru helvt, varð tað IM Jens Ove Fries Nielsen, sum greitt domineraði seinnu helvt og vann 3rd Klaksvík International. Heini Olsen hevði somuleiðis ein góðan endaróður og fekk eitt deilt annað pláss**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Sunnudagin blivu seinastu leikirnir í 3rd Klaksvík International leiktir og harvið enn ein altjóða kappingarsucces í Klaksvík lagt aftrat rúgvuni í føroyskari talvsøgu. Alt tað praktiska gekk væl fyri seg og takka bulleting-skrivaranum og fjølmiðlamanninum, sum fyriskiparin Rani Nolsøe hevði skaffað sær, varð kappingin sjónlig í bløðunum og útvarpinum. Talvini øll, kappingartalvan og myndir eru at síggja á www.ktfchess.com

Á talvliga økinum var støðið eisini á gongdari leið. Hóast tað vórðu heldur ov nógvir skjótir javnleikir, varð kappingin spennandi við eisini mongum fløktum álopstalvum.

### Heini í góðum formi

Sviin Emil Hermansson og Jens Over Fries Nielsen togaðust leingi um fyrsta pláss. Men tá Jens Ove vann á júst Emil í triðseinasta umfari, var kappingin í veruleikanum avgjørd. Við tveimum skjótum javnleikum móti Heina og Ólavi, kundi Jens Ove kalla seg vinnara av 3rd Klaksvík International.

Landsmaðurin Kim Pilgaard vann 1st Klaksvík International í 2002 og í fjør vann sviin Johan Eriksson kappingina.

Heini Olsen telvaði sum ein brandur seinastu fýra umførini, har hann vann sær hálvtfjórða stig. Tíverri hevði hann miðskeiðis í kappingini latið ov nógv stig frá sær og blandaði hann seg tí ikki reiðiliga í oddastríðið. Eitt flott deilt annað pláss fekk hann tó fyri ómakin og tað er einki at klaga yvir. Góða talvárið 2004 hjá Heina heldur fram.

Føroyameistarin og komandi 1. borð á føroyska OL-liðnum, Martin Poulsen, er neyvan nøgdur við sítt avrik. Ikki tí, hann leikti fleiri góð talv, men hinvegin fekk hann lítið og einki burturúr fleiri góðum støðum. Kappingin er ivaleyst góð venjing fyri Martin innan talvolympiaduna, sum verður 14-31. oktobur.

Tá Ólavur vann á Hermansson í fimta umfari, lá klaksvíkingurin á deildum fyrsta plássi. Men ein skuffandi seinna helvt, har Ólavur einans fekk eitt stig, endaði hann á aftasti plássi saman við Sævar Bjarnason. Tó vinnur hann sær umleið 20 ratingstig fyri síni 4 stig, og sigur hetta okkum hvussu sterk kappingin í veruleikanum var.

### Endaliga støðan

1 IM Jens O. F. Nielsen 6,5/10
2 IM Emil Hermansson 5,5
2 Heini Olsen 5,5
4 Martin Poulsen 4,5
5 Ólavur Simonsen 4,0
5 IM Sævar Bjarnason 4,0

### Íslandssúlan

Siðvanda Íslandssúlukappingin varð telvað hetta vikuskiftið í Klaksvík. Fimm umfør vórðu leikt uppá tríggjar dagar. Bert ein telvari yvir 2000 í rating hættaði sær við, nevnliga Finnbjørn Vang (2042). Tann næsti í røðini var Tummas Martin Anthoniussen (1957) og tískil varð kappingin ikki so sterk sum væntað og vónað.

Ein kann við góðari orsøk seta spurnartekin við luttøkuhugin hjá føroyskum telvarum fyri tíðina. Serliga eru tað telvarar millum 2000-2200 í rating, ið eftir mínum tykki eru óvanliga passivir. 14 telvarar tóku lut, tólv úr Klaksvíkar Talvfelag og tveir úr Havnar Telvingarfelag.

Finnbjørn var greiður favorittur og vann hann eisini sum væntað kappingina við fullum stigatali. Ingolf Gaard bleiv nr. 2 við fýra stigum, meðan heili seks telvarar endaðu triðfremstir við trimum stigum. Úrslit við meira finnast á www.ktfchess.com

## Fakta um dystin

**Sveis-Føroyar 6-0 (4-0)**
**HM undankapping**

Leygardagin 4. september 2004, kl. 17.30 í St. Jakob Park í Basel
1-0: Johan Vonlanthen 10.
2-0: Johan Vonlanthen 14.
3-0: Alexander Rey 29.
4-0: Alexander Rey 44.
5-0: Alexander Rey 55.
6-0: Johan Vonlanthen 56.
Dómarakvartett úr Rumenia: Alexandru Dan Tudor, Marcel Savaniu, Cristian Nica og Augustus Viorel Constantin
13.013 áskoðarar
Sveis: 1. Pascal Zuberbühler, FC Basel — 2. Bernt Haas, West Bromwich Albion, 5. Murat Yakin, FC Basel, 4. Patrick Muller, RCD Mallorca, 3. Christoph Spycher, Grasshopper-Club (19. Ludovic Magnin, SV Werder Bremen, 46.) — 7. Ricardo Cabanas, Grasshopper-Club (16. Benjamin Huggel, FC Basel, 63.) 6. Johann Vogel, PSV Eindhoven, 10. Hakan Yakin, VfB Stuttgart, 8. Raphael Wicky, Hamburger SV — 9. Alexander Rey, Neuchatel Xamax FC (18. Thomas Haberli, BSC Young Boys, 75.), 11. Johan Vonlanthen, PSV Eindhoven
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: 12. Sébastian Roth, Servett FC, 14. Stéphane Henchoz, Liverpool FC, 15. Johann Lonfat, Sochaux Montbéliard, 17. Tranquillo Barnetta, Hannover 96
Gult kort: Wicky 50.
Venjari: Jakob Kuhn
Føroyar: 1. Jens Martin Knudsen, NSÍ, 63/-165 - 4. Pól Thorsteinsson, B36, 34/0, 3. Óli Johannesen, TB, liðformaður, 67/1, 5. Jón Rói Jacobsen, BK Frem, 17/0, 2. Súni Olsen, GÍ, 15/1 — 9. Jákup á Borg, HB, 34/2 (18. Atli Danielsen, KÍ, 5/0, 63.), 8. Julian Johnsson, ÍA, 57/4, 7. Fróði Benjaminsen, Fram, 27/2, 6. Claus Bech Jørgensen, Coventry, 1/0 (13. Johan Byrial Hansen, AC Horsens, 11/0, 70.), — 10. John Petersen, B36, 54/6 (12. Rógvi Jacobsen, HB, 27/4, 57.), 11. Jónhard Frederiksberg, Skála, 4/0
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: 16. Jákup Mikkelsen, KÍ, 33/-61, 14. Andrew av Fløtum, Fremad Amager, 13/1, 15. Jann Ingi Petersen, Fremad Amager, 10/0, 17. Hjalgrím Elttør, Fremad Amager, 12/0
Gult kort: eingin
Reytt kort: eingin
Venjari: Henrik Larsen
Hjálparvenjari: Jógvan Martin Olsen
Liðleiðarar: Birgir Hansen og Heðin Askham
Lækni: Jens Pauli Marstein
Fysioterapeutur: Álvur Hansen og Øssur Steinhólm

## Talvið hesa vikuna

**Ólavur Simonsen 2205 - Heini Olsen 2363**
3rd Klaksvík Int. 2004 (2. umf.)

**1.e4 c5 2.Rif3 e6 3.d4 cxd4 4.Rixd4 a6 5.Ric3 Fc7** (Eftir mínum tykki ein spennandi variantur í sicilionsku byrjanini, sum eg sjálvur mangan nýti. Ein fleksibul svørt støða, har møguleikarnir eru nógvir) **6.Be2 Rif6 7.0—0 Ric6 8.Be3 b5 9.a3 Bb7 10.f4 h5** (Áhugaverdur leikur, sum gevur hvítan okkurt at hugsa um kongamegna. d6 var tann tryggi leisturin. Hvat ætlar svartur við h5?) **11.e5 Rig4** (Finnuoffur sum gevur gott spæl) **12.Bxg4 hxg4 13.Rixc6 Fxc6 14.Fxg4 0—0—0 15.Rae1 Be7** (Um Svartur hevur nóg mikið fyri offraðu finnuna, er ringt at siga. Neyðugt er hjá svørtum allatíð at leika aktivt) **16.Bf2?** (Re2 var besti leikur) 16...f5! (Heini fær nú opnað støðuna upp við t.d. g5, um Ólavur ikki letur finnuna aftur) **17.Ff3 Fxf3 18.gxf3 Bxf3 19.Bb6 Bc6 20.Bxd8**
**Støðumynd eftir 20.Bxd8**



**20...Bc5+** (Heini fær rókin aftur + h-finnuna) **21.Rf2 Bxf2+ 22.Kxf2 Rxh2+ 23.Ke3 Kxd8 24.Re2?** (Rie2 einasti leikur við skili) **24...Rh3+** f-finnan verður etin **25.Kd4 Rf3 26.Kc5 Kc7** Ólavur gavst **0—1**


KOYRIKORT Í VÁGUM
Í GAMLA SKÚLA Í SANDAVÁGI

**Til persónbil:**
Týsdagin 9. september kl. 19.00

**Til lastbil:**
Týsdagin 9. september kl. 20.30



**Persónbil · lastbil · trailara og buss**
Tekning á tel 573 940

HAMMERS
KOYRISKÚLI
v/Johannus Hammer · Tel 573 940